HEILSANIR

Elskaða! Endiliga kom tú í dans við mær. Eg royndi at lokka teg til Showmenn, men nei. Eg royndi við Jacob aftur nei. Hygg hvussu stuttligt tað er. Hjartaliga tillukku við 28 ára degnum. Eg elski teg.
Tín Skipper

Góða lat meg teska tær nakað! Fyrst: Tað var ikki mín feilur, at eg krasjaði bilin og fyri tað næsta, eg elski teg. Hjartaliga tillukku á 33 ára degnum.
Tín Schumacher

Nei, nei, nei! Góði søti, keri lurta eftir mær fyri einaferð skyld. Ikki gera soogsoogso, men soogsoogso. Eg vil fegin hjálpa tær, men havi sooo ilt í albógvanum!!
PS. pipipipipipi :)

Hey hey øll somul!
Vita tit hvat? Eg havi føðingardag. Um tit møta mær, so kunnu tit gott geva mær ein muss og eitt klemm, bara ikki hála í oyruni. Hjartaliga tillukku.
Hr. Flick og mr. Panecakeman

Okkara elskaða Rakul
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum í dag. Alt tað besta ynskja vit tær.
Kærar heilsanir omma og abbi

Góði beiggi
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum.
Ynskir Beinta

Halló hon sjálv
Hvar blivu tú og kakan av? Vit ganga enn og bíða.
Heilsan vit sum høvdu frí hósdagin
PS. Hetta er bara fyrsta áheitanin, so skunda tær nú.

Sosialurin

Heilsanir

kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: _____

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____ Tlf.: _____

Sendið lepan, vmynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: **>>Heilsanir<<**

TILTØK

Gudstænastur
4. sunnudag e. Trinitatis
Vesturkirkjan: kl. 11,
Kirkjubøar kirkja: kl. 12.15, Heri Joensen
Argja kirkja: kl. 11, Bergur D. Joensen. Familjugudstænasta. Altargangur.
Norðskála: kl. 10.40 Skriftamál, kl. 11 Messa, kl. 15 Barnagudstænasta (bønr syngja) Emil Olsen
Sørvágur: kl. 11, David Johannesen
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altarg.
Fámjin: kl. 12, Jónsvein Bech

Havnar kirkja
Leygardagin 18. juni kl. 11.30 Matiné – íslendskur saxofonspælari (trio).

Evangeliihúsið, Tróndargøta
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti, einki kvøldmøti.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.gospel.fo

Fríkirkjan Oasan
Kirkjustræti 4
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jóna Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Familjugudstænasta.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

Frá Ebenezer
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Mikudag kl. 15 Bønarfundur.
Leygardagin verður loppumarknaður og tombola kl. 10. Vit taka ímóti loppum hósdag og fríggjadag kl. 18 til 21.

Meinigheitshúsið
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti, hugnakvøld.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Hera Joensen.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Hósdagin kl. 20 Bíbliutími v/ Signar á Reynatrød, Hoyvík. Evnið: Mika kap. 6.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Familjugudstænasta v/ Bergi D. Joensen. Kl. 19 Møti við Marjan Kass Nielsen, Nes. Tema: Guds umsorgan.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Sandavágur – Sunnudagsskúlin
Sunnudagin 19. juni fara vit busstúr til Argir, har verður barnagudstænasta kl. 11.00. Bussurin koyrir frá meinigheitshúsinum kl. 10.00. Havið matpakka við. Børn og foreldur eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Miðvágur
Mikukvøldið kl. 20 Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti hjá Lonu og Dánjal.
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Napoleon í Lon talar.

Saron, Vestmanna
Í kvøld verður bønarmøti kl. 20 og útimøti kl. 21.
Hóskvøldið verður evangel. møti við Jens Peder Pedersen og Steve Dulvich kl. 20. Verið hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð, Saltangará
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20.30 Útimøti (um viðrar).
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Arna Abrahamsen.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17.

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Richard Danielsen talar. Evnið: »Ert tú í aldudalinum? Minst til, at tú ert ikki tann einasti«. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

KFUM og K, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Una Næs. Evnið: »Dópur«. Drekkamuður verður aftaná.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

KFUM og K, Klaksvík
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Johannis Johannesen.

Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími, Rómv. 16. kap.

Missiónshúsið í Sumba
Missiónsvika verður hesar dagar:
Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 Møti í Missiónshúsinum.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti í Missiónshúsinum. Hesi luttaka: Jógvan Lamhauge og Thomas J. Askham tala.
Streingjakórið í Porkeri og kórið í Sumba syngur.
Innsavnan verður til húsið sunnukvøldið.
Mánakvøldið 20. juni kl. 20 Møti í skúlanum á Leiti v/ Thomas J. Askham.
Øll eru vælkomin til møtini.

Ørkin, Reykjavík
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 13. juni: